


## FUNDIR, TILTØK O.A. Í SEPTEMBER:

**3. sept.** Sendimaðurin heldur fyrilestur um føroysk politisk- og samfelagsviðurskifti, og umrøður úrslitið av løgtingsvalinum í felagnum fyri fyrrv. íslendsk sendifólk.

**9. sept.** kemur nýggja norska sendikvinnan vitjar sendimannin og Sendistovuna (kurteisisvitjan).

**10. sept.**
Fyrrapartin: Fyrilestur hjá Shri Ram Nath Kovind, forseta India í sambandi við almenna vitjan í Íslandi.

Seinnapartin: luttøka í setanini av Altinginum í á.v.v dómkirkjuni og Altinginum.

**11. sept.** Morgunfundur í Arion Banka (greiningardeildin) um íslendsku ferðavinnuna.
Um kvøldið: til móttøku hjá finsku sendikvinnuni í sambandi við finskan tónleik hjá ísl. Synfoni Orkestrinum.

**23. sept.** taka lut i Útnorðurdegnum hjá Norrøna húsinum og hjá Norrøna felagnum í Reykjavík.

## LOKSINS VARÐ 3. ORKUPAKKIN GÓÐKENDUR Í ALTINGINUM

ES góðtók triðja orkupakkan í 2009, sum m.a. fevnir um at skilja sundur útboð og framleiðslu av el, skapa frælsa kapping á orkuøkinum og veitingartrygd. Ísland er partur av EBS, eins og Noreg o.o. Norska Stórtingið samtykti triðja orkupakkan í 2018, hóast mótstøðan var stór og viðgerðin tók næstan 5 tímar í Stórtinginum. Síðan hevur Norska stjórnin lagt stórt trýst á Ísland um, at samtykkja 3. orkupakkan, so hann kann koma í gildi fyri hesi lond. Íslendska stjórnin legði triðja orkupakkan fyri Altingið í februar í ár.
Við tað at Ísland er partur av EBS, so eigur Ísland at samtykkja flestu ES lógir og reglur. Hóast triði orkupakkin m.a. fevnir um orku yvir landamørk innan ES/EBS, so er íslendska el-netið ikki bundið í streymskipanina á fastlandinum og átti tí lógin ikki at hava havt týdning fyri Ísland á hesum øki. Men Miðflokkurin var av aðrari áskoðan og førdi m.a. fram, at við at samtykkja lógina, so vildi Ísland geva ES kontroll yvir Íslendsku orkuni.

> *» Kjakið í Altinginum í hesum máli gjørdist ógvuliga drúgt og vardi í 134 tímar. Ofta tosaðu Miðflokkatingfólkini bert við hvørt annað í einum tómum Altingssali.«*

Hesin minniluti (9. altingsfólk av 63) hava forðað tingviðgerðini av hesum máli og øðrum málum við, við at halda nógvar og ovurlangar røður (sum á enskum nevnist "filibustering"). Fyri at steðga hesari viðgerð, varð gjørt av at útseta málið til í endan av august mánaði, tá Altingið møtti aftur til at viðgera og samtykkja triðja orkupakkan. Triði orkupakkin varð samtyktur við 46 atkvøðum fyri og 13 ímóti.

Nógvir serfrøðingar hava verið hoyrdir í hesum máli og serfrøðingar uttanlands hava eisini verið og greitt uttanlandsnevndini, sum hevði málið til viðgerðar, frá. Tað tykist sum at semja er um, at triði orkupakkin hevur onga ávirkan á ræðið hjá íslendsku stjórnini yvir orkutilfeingið. Hóast hetta, so hava fleiri mótmælisgongur verið, sum hava stuðlað mótstøðuni hjá Miðflokkinum.

Hetta er næstlongsta viðgerðin í Altinginum, síðan bæði tingini vórðu løgd saman í 1991. Bert viðgerðin av IceSave vardi longur. Stýrisskipanin loyvir tingforsetanum at avmarka ella enda viðgerðina, men tað vildi hann ikki.

## AVMARKA RÆTTIN HJÁ ÚTLENDINGUM AT KEYPA ÍSLENDSKA JØRÐ




*Mynd 1. Í hesum 8 frámerktu støðunum, eru 59 jarðarlutir og aðrar fastognir ogn hjá útlendskum pørtum. (Meira um hetta sæst í næstu hjáløgdu leinkju)*

*Heimild: Mbl.is*

Fitt av jørð er keypt av útlendingum seinastu árini í Íslandi. Flutnings- og kommunumálaráðharrin, Sigurður Ingi Jóhannsson, vónar, at tað fer at bera til hjá stjórnini í heyst, at leggja fram lógaruppskot, sum kann forða útlendingum í at ogna sær jørð í Íslandi. Ráðharrin heldur at Ísland eigur at hyggja nærri at, hvat er gjørt á hesum øki í Noregi og í Danmark. Uppskot hava verið frammi um, at jarðareigarar eiga at búgva á staðnum og útlendskir eigarar hava skyldu til at hava fastan bústað á ognini. Hetta kemur m.a. fram í einari frágreiðing frá august í fjør.

Arbeitt verður við málinum undir leiðslu av forsætisráðharranum, Katrín Jakobsdóttur, av tí at hetta øki fevnir um fleiri lógarøki og harvið fleiri ráðharraráð. Sigurður Ingi heldur, at íslendska stjórnin eigur at fara so langt sum til ber.

Katrín Jakobsdóttir, forsætisráðharri, er sannførd um at tað er ein tvørpolitiskur vilji fyri at hava strangar reglur á hesum øki, eins og er í fleiri av grannalondum Íslands. Út við ein triðingur av allari jørð í Íslandi, er ogn hjá fyritøkum. Upplýsingar um tjóðskapin hjá eigarunum av hesum fyritøkum eru ikki tøkir, og tí ber ikki til at siga, hvussu stórur partur av íslendsku jørðini er ogn hjá útlendingum.

*Sí meira her (á enskum) og her (grein á íslendskum, sum lýsir støðuna nærri) og her (frágreiðingin á íslendskum)*

## SERLIG LÁN TIL NÝBYGGING ÚTI UM LANDIÐ



*Mynd 2. Ásmundur Einar Daðason, almannamála-ráðharri, undirskrivar her broytingina í reglugerðini um lánsflokkking hjá ísl. Húsalánsgrunninum*

Íslendska stjórnin hevur tikið stig til at seta skipan í verk, so til ber at fáa lán í økjum, har trupult kann vera at fáa lán. Ásmundur Einar Daðason, almannamálaráðharri, boðar frá, at har sum frí marknaðurin ikki røkkur, har má stjórnin traðka til.

Ráðharrin staðfestir, at broytingin er fyri nýggj lán til nýbygging í tí parti av landinum, har tað vantar hús og lítið verður bygt av nýggjum húsum. Endamálið er at veita fólki á staðnum somu møguleikar at fáa tak yvir høvdið, sum teimum, ið búgva í meira virknum økjum. Lánini eru markaði til støð við væl av arbeiði, men ikki nóg mikið av bústøðum. Vantandi býli eigur ongantíð at vera orsøkin til, at virkir ikki kunnu seta fólk í leys størv.

Trupulleikin er, at kostnaðurin av at byggja nýggj hús kann fara uppum handilsvirðið har, sum prísstigið er væl lægri enn í høvuðsstaðarøkinum. Lágir húsaprísir í smáum býum/bygdum, er ikki tað sama sum lítil eftirspurningur, serliga ikki til at leiga.

Henda fígging er bert fyri nýbygging í støðum, sum alment er staðfest av íslendska Húsalánsgrunninum, at har vantar bústaðir. Umsøkjarar mugu prógva, at teir ikki kunnu fáa lán frá øðrum lánveitarum ella at lánið gerst væl dýrari (hægri renta) samanborið við verkætlanir í størri býum.

*Sí meira her (á enskum)*

## MEIRA BURTURÚR VIÐ FÆRRI FERÐAFÓLKUM



*Mynd 3. Bjarni Benediktsson, fíggjarmálaráðharri.*

Tá WOW-air steðgaði sínum virksemi í mars mánaði í ár, varð mett at miðalúrtøkan fyri hvørt ferðafólk fór at vaksa, tí WOW-air var eitt sonevnt lágprísflogfelag, sum seldi ódýrar flogferðaseðlar.

Tað vísir seg nú, at hóast talið av ferðafólkum higartil í ár er lækkað við uml. 20%, so nýtir hvørt ferðafólk meira enn áður. Miðal nýtslan fyri hvørt ferðafólk í Íslandi í ISK er uml. 25% hægri enn fyri einum ári síðan. Hetta er m.a. orsakað av, at ferðafólkini eru til reiðar at nýta somu upphædd í teirra heimligа gjaldoyra, sum áður og við einari veikari krónu, hevur tað ávirkan. Hetta staðfestir íslendski fíggjarmálaráðharrin, Bjarni Benediktsson, í samrøðu við RÚV.

Víðari sigur Bjarni, at eitt annað er, at – hóast talið av ferðafólkum er munandi lækkað – so er talið av gistináttum ikki fallið so nógv hjá hotellunum, sum í mai mánaði bert hevði eina lækking uppá 1%.




*Mynd 4. Yvirlit yvir umsetning hjá útlendskum ferðafólkum - broyting millum ár - útroknað á hvørt einstakt ferðafólk. Reyða linjan er broytiligt gjaldoyra, meðan grøna linjan er gjaldoyrað í føstum virði. Sum myndin vísir, so eru munandi hækkingar í nýtsluni hjá hvørjum ferðafólki sær.*
*Heilmild: Arion Banki.*

Sambært Arion Banka, so nýtir hvørt ferðafólk 28% meira í ISK í Íslandi í apríl og 30% meira í mai enn árið frammanundan. Kredittkort nýtslan fyri hvørt ferðafólk hevur ongantíð verið hægri enn í mai og harumframt vísir nýtslan, at hvørt ferðafólk nýtir meira í egnum gjaldoyra enn áður. Hetta er ein gongd, sum er sera týdningarmikil fyri íslendska búskapin. Farast skal heilt aftur til 2016, fyri at síggja so stóran árligan vøkstur, og 2016 var eitt sonevnt gullnámsár fyri íslendska ferðavinnu, har talið av ferðafólkum hækkaði við upp til 40%, staðfestir Arion Banki í sínari frágreiðing.

*Sí meira her (á enskum) og frágreiðingin frá Arion Banka her (á íslendskum)*

## ÍSLENDSKI UTTANRÍKISRÁÐHARRIN VITJAR Í GRØNLANDI



*Mynd 5. Ane Lone Bagger, uttanríkisráðharri Grønlands, og Guðlaugur Þór Þórðarson, uttanríkisráðharri Íslands.*

Guðlaugur Þór Þórðarson, uttanríkisráðharri vitjaði í august mánaði Ane Lone Bagger, uttanríkisráðharra Grønlands. Guðlagur Þór var á vinnuferð í Grønlandi fyri at kunna seg um vinnuliga virksemi, kommunur og hvørt tørvur er á íslendskum íløgum. Samskiftið millum londini bæði er munandi økt og tað hevur týdning fyri Ísland at styrkja hesi viðurskifti. Íslendskar fyritøkur eru við til at byggja upp fyritøkur í Grønlandi, og tað verður áhugavert at kunna seg um hesar fyritøkur í framtíðini, sigur Guðlaugur Þór.

Ráðharrarnir umrøddu tvíliðaða sambandið millum londini, m.a. handilssamband, fyritøkur, so sum øktir møguleikar í sambandi við flogsamband, bæði frakt og ferðafólk, menning av ferðavinnuni, sjóflutning, økt samstarv á útbúgvingar-, menta-, list- og samskiftisøkinum millum íslendsk og grønlendsk samtøk. Somuleiðis varð Arktiska og Norðurlendska samstarvið á skránni, nú Ísland hevur formansskapin í báðum. Ráðharrarnir samdust um at halda teirra árligu fundir í sambandi við ársfund Útnorðurráðsins, sum í ár verður í oktober í Nuuk.



*Mynd 6. Össur Skarphéðinsson, fyrrv. uttanríkisráðharri, er formaður í arbeiðsbólkinum, sum skal økja um samstarvið millum Ísland og Grønland.*

Í ferðalagnum hjá Guðlaugi Þór var Össur Skarphéðinsson, fyrrv. uttanríkisráðharri í Íslandi og formaður í arbeiðsbólkinum fyri økt samband millum Ísland og Grønland. Össur greiddi frá arbeiðinum hjá bólkinum og tey hugskot, sum tey hava. Grønlendski ráðharrin var positivur fyri hesum og kom við fleiri góðum ráðum og hugskotum, sum ráðharrarnir komu ásamt um at arbeiða víðari við.

*Sí meira her (á íslendskum)*




*Mynd 7. Útflutningur Íslands fyrstu 7 mánaðirnar í ár. Íslendska flaggið merkir útflutningur Íslands til Føroya og føroyska merkið merkir føroyska innflutningin til Íslands (= føroyska útflutningin til Íslands). Heimild: Hagstofa Íslands.*

## *VØRUHANDILIN MILLUM FO OG ÍS HIGARTIL Í ÁR JAVNVIGAR*

Verður hugt at vøruhandlinum higartil í ár (januar til juli), so sæst at Ísland hevur munin fyrstu fýra mánaðirnar (jan.- apríl), men Føroyar hevur munin seinastu tríggjar mánaðirnar (mai – juli). Samlað sæð (januar til juli), so er munurin ikki serliga stórur fyrstu 7 mánaðirnar av hesum ári. Ísland hevur útflutt fyri 2.195 mió. ISK (~119 mió. DKK) til Føroya og Ísland hevur innflutt úr Føroyum fyri 2.056 mió. ISK (~112 mió. DKK), ella ein munur uppá 139 mió. ISK (~7 mió. DKK).
Tølini fyri tænastuhandilin millum londini fyri 2019 eru ikki uppgjørd enn, men vanliga hava vit rímiliga stórt avlop av tænastuhandlinum við Ísland.
Seinastu árini hevur Ísland havt rímiliga stórt avlop av vøruhandlinum, meðan Føroyar hevur havt samsvarandi ella størri avlop av tænastuhandlinum, so samlaða úrslitið hevur verið, at Føroyar samlað hava havt avlop av samhandlinum við Ísland.

## SENDISTOVAN Í AUGUST MÁNAÐI:

## DØGURÐI Á BESSASTÖÐUM Í SAMB. VIÐ SUMMARFUNDIN HJÁ NORÐURLENDSKU FORSÆTISRÁÐHARRUNUM



*Mynd 8. Bessastaðir, har forseti Íslands býr og hevur móttøkur.*

Forseti Íslands hevði bjóðað norðurlendsku forsætisráðharrunum og norðurlendsku sendimonnunum til døgurða á Bessastøðum 20. august. Føroyski sendimaðurin tók eisini lut. Eitt sera áhugavert kvøld við øllum tí, sum hoyrir til eitt norðurlendskt tiltak, t.d. framúr góður íslendskur matur, góðar og skemtingarsamar røður. Føroyski sendimaðurin tosaði við allar norðurlendsku forsætisráðharrarnar, burtursæð frá norska forsætisráðharranum, sum barst frá at taka lut. Allir forsætisráðharrarnir vóru sera áhugaðir í føroyska løgtingsvalinum og um føroysk viðurskifti sum heild. Nógv varð greitt frá og nógvir spurningar vórðu svaraðir. Eisini íslendski forsetin hevði stóran áhuga í viðurskiftunum í Føroyum og ynskti at frætta nærri um tey.

## MENTANARNÁTT Í REYKJAVÍK



*Mynd 9. Menningarnátt í Sendistovuni*

Sendistovan hevur verið partur av mentanarnáttini í Reykjavík (Menningarnótt) síðan 2011. Menningarnótt varð hesaferð hildin tann 24. august og sum áður, skipaði sendistovan fyri tiltøkum. Seinnapartin var opið hús á sendistovuni, har varaborgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Gunvør Balle, helt setanarrøðu. Kári Sverrisson undirhelt við tónleiki, og Listagluggin við Mortan Carlsen hevði listaframsýning. Borðreitt varð við føroyskum mati og drykkjum, ið Marentza Poulsen hevði gjørt til. Gott og væl 500 gestir vitjaðu sendistovuna henda dagin.

Harumframt skipaði sendistovan fyri konsertum í Hörpu, sum øll árini hevur lánt okkum pall. Í ár vóru tað, VSJ, Kári Sverrisson og JASMIN, ið

framførdu fyri umleið 300 væl nøgdum gestum. Samanumtikið eitt væl eydnað tiltak og ein góður sýnisgluggi hjá føroysku tónleikabólkunum.

## FYRILESTUR UM VALIÐ



*Mynd 10. Fyrilestur og pallborðsfundur í Norðurlanda-húsinum í Reykjavík.*



Sendimaðurin helt fyrilestur í Norrøna húsinum 26. august. Norrøna felagið í Reykjavík og Norðurlond í fokus hevði heitt á sendimannin um at halda fyrilestur um politisk viðurskifti og valið í Føroyum í Norðurlandahúsinum í Reykjavík. Fitt av fólki møtti til fundin og spyrjihugurin var stórur. Aftaná fyrilesturin var pallborðsfundur, har umframt sendimannin, luttóku Björg Eva Erlendsdóttir (fyrrverandi formaður í Norrøna felagnum í Rvk. og skrivstovustjóri hjá Vinstra Grønum), Bryndís Haraldsdóttir, (altingslimur og limur í ÚNR), Gísli Gíslason (havnarstjóri og varaformaður í FO-IS handilskamarinum) Sif Gunnarsdóttir (skrivstovustjóri í Reykjavíkar kommunu og fyrrv. stjóri í Norðurlandahúsinum í Føroyum). Orðstýrari var Bogi Ágústsson (sjónvarpsvertur og formaður í Norrøna felagnum í Íslandi). Spurningarnir vóru nógvir og fleiri áhugaverd evni vórðu umrødd. Tiltakið vardi í 1 ½ tíma. RÚV og aðrir miðlar vóru møttir upp til tiltakið og vórðu samrøður við m.a. sendimannin vístar í tíðindasendingini sama kvøld, eins og kjaksending um sama evni varð sent seinni um dagin í RÚV útvarp, har fleiri av pallborðsluttakarunum í Norrøna húsinum vóru við.

## VALKVØLD Í SENDISTOVUNI




*Mynd 11. Sendimaðurin í beinleiðis samrøðu í tíðinda-sendingini hjá RÚV valkvøldið.*

Sendistovan, saman við Norrøna felagnum í Rvk. og Norðurlond í Fokus, skipaði fyri valkvøldi í Sendistovuni 31. august. Fáir føroyingar møttu, men fitt av íslendingum komu. Nógvir spurningar vóru um føroysku valskipanina, tí hon er ørðvísi enn tann íslendska, t.d. hava íslendingar listaval, t.v.s. at tað eru flokkarnir sum gera av, í hvørjari røð valevnini standa á vallistunum og harvið, hvør verður fyrstvaldur, næstvaldur o.s.fr. óansæð, hvussu nógvar atkvøður einstøku valevnini fáa. Eisini hava íslendingar 6 valdømi. Íslendska sjónvarpið (RÚV) møtti eisini upp til tiltakið og sendi beinleiðis frá Sendistovuni í tíðindasendingini, m.a. beinleiðis samrøðu við sendimannin. Hetta var fyrstu ferð, vit royndu hetta og einki er at ivast í, at hetta er vert at royna aftur.

**SENDISTOVA FØROYA Í REYKJAVÍK**
**TÚNGATA 14**
**101 REYKJAVÍK**

Tlf. +354 511 3200 T-postur: reykjavik@uvmr.fo
www.uvmr.fo Finn okkum á Facebook